Lýsingartorgið
5 ferðir um vikuna

tíðindablaðið
**sosialurin**
Telefon 11820 Telefax 14720

Sosialin finnur tú á Internet:
http://WWW.cybernet.dk/faroe-news
e-mail: sosialur@olivant.fo

# Sparikassi í oljuhýri

*-Nú oljuvinnan tykist troðka seg alsamt meira á, krevur hetta, at bæði tað almenna og tað privata taka støðu til, hvussu samfelagið skal laga seg til eina møguliga oljuvinnu, sum fer at hava so stórt árin bæði so og so skrivar Eyðun á Rógvi Olsen, stjóri í Føroya Sparikassa í oddagrein í blaðnum, Ábyrgdarin. Upplýsing um hesi mál er neyðug og gagnlig leggur hann aftrat*




JAN MÜLLER

At eisini landsins størsti sparikassi, Føroya Sparikassi er farin at vísa oljuvinnuni áns er nýggjasta útgávan av blaðnum „Ábyrgdarin" eitt gott prógv um.

Í blaðnum, sum júst er útkomið og sum fyri fyrstu ferð verður sent til øll húski í landinum, verður høvuðsdenturin lagdur á spurningar, sum hava tilknýti til eina møguliga komandi føroyska oljuvinnu.

Undir yvirskriftini „Føroya størsta avbjóðing" greiðir Jógvan Arge, journalistur og rithøvundi væl og lætt frá gongdini og støðuni í oljumálinum og vísir á, at oljan kemur storleypandi.

**Tevja gull**

Trýstið á føroyska samfelagið og føroysku myndugleikarnar herðist fyri hvønn dag. Oljufeløg tevja gull undir Føroyum og vilja sleppa at royna eftir tí sum skjótast" skrivar hann og heldur fram.

„Dømi eru um lond og samfeløg, sum hava verið ov grømm og óhugvin til allar teir pengarnar, sum oljuvinna hevur kastað av sær. Tey fótaðu sær ikki í meldrinum.

Gongur alt eftir vild undir Føroyum, verður tað eisini ein spurningur um at hava breiðar herðar. Tað skula sum kunnugt breiðir herðar til at bera góðar tíðir" skrivar Jógvan Arge í blaðnum.

**Almenna og privat mugu taka støðu**

Eisini stjórin í Føroya Sparikassa, Eyðun á Rógvi Olsen nemur við oljuvinnuna í oddagreinini í Ábyrgdararnum.

Hann skrivar, at nú oljuvinnan tykist troðka seg alsamt meira á, krevur hetta, at bæði tað almenna og tað privata taka støðu til, hvussu samfelagið skal laga seg til eina møguliga oljuvinnu, sum fer at hava stórt árin bæði so og so.

Sparikassastjórin vísir á, at orsøkin til, at ein stórur partur av Ábyrgdaranum hesaferð snýr seg um olju og møguliga oljuvinnu í Føroyum er ásannanin av, at upplýsing um hesi mál er neyðug og gagnlig.

Í oddagreinini vísir Eyðun á Rógvi Olsen annars á, at Føroya Sparikassi er komin væl frá teimum fíggjarligu og búskaparligu rembingunum í Føroyum hesi seinastu árini, og stovnurin ætlar eisini í framtíðini at varðveita sítt eyðkenni sum peningastovnur kontaktaranna.

**Fylgja væl við**

Í grein í blaðnum skrivar Wilhelm Petersen, kredittleiðari, at Føroya Sparikassi ásannar, at tað verður ikki hann, sum fer at fíggja stóra oljuvinnu undir Føroyum. Til tess standa tær stóru íløgurnar í hesi vinnu ikki mát við støddina á einum føroyskum peningastovni.

„Men Sparikassin fylgir við í gongdini og fer at veita føroyskum fyritøkum tær tænastur og ta ráðgeving, sum tær hava brúk fyri" skrivar Wilhelm Petersen og heldur fram: „Stevnan hjá Sparikassanum er at fíggja ætlanir, sum møguleikar eru í, og fyritøkur av hesum slag verða áhugaverdar, tekur oljuvinnan seg upp, tí tær fáa ein størri heimamarknað, íð hvussu er eina tíð."

Upplýst verður annars, at í seinastuni hevur Sparikassin útbygt tær uttanlandstænastur, sum oljuvinnan hevur brúk fyri. Oljufeløg og føroyskar fyritøkur, sum fara at arbeiða her, fara at hava brúk fyri peningaflutningi. Hetta eru eisini tænastur, sum oljufeløgini sjálvi spyrja eftir.

Í Ábyrgdaranum eru annars fleiri aðrar áhugaverdar greinar. Tað eru Egil Olsen og Per Jacobsen, sum stjórna blaðnum. Snøgga layoutið og luftigu umbrotingina hevur Sansir staðið fyri. Prentað hevur Estra.



*Eyðun á Rógvi Olsen, sparikassastjóri*

Ábyrgdarin er sambindingarlið millum Føroya Sparikassa og ábyrgdarar Sparikassans og kemur út tvær ferðir um árið.



*Jógvan Arge, tíðindamaður hevur verið við á fleiri „oljuvitjanum" í útlandinum*

**Vestfalskyrrindi**

**25. november: Fullmáni**
**1. desember: Mánin longst frá jørðini**
**3. desember: Seinna kvarter**

| Dato | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | Haraldssundi/ Leirvíksfirði fp. | sp. | Skávoyarfirði/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 29 nov | 0940 | 2202 | 1140 | – | 0755 | 2017 | 0955 | 2217 | 0840 | 2102 | 0855 | 2117 |
| 30 nov | 1024 | 2245 | 0002 | 1224 | 0839 | 2100 | 1039 | 2300 | 0924 | 2145 | 0939 | 2200 |